ÍF-Fram 3-1 (25-15,23-25,25-11,25-21)

Fuglafjørður livdi

ísaskodarar: We are red, we are white – We are ÍF Dynamite!, róptu tey so trúfast á Kambsdali leygardagin.

Stuðulin var øgiligur, tá menninir hjá ÍF fingu løn fyri stríðið, og greipan var endaliga staðfest

FLOGBÒLTUR
Orð:Heri á Rógvi
Myndir: Finnur Justinussen

Undan dystinum var alt longu avgjørt. ÍF er føroyameistari fyri kappingarárið 2002/2003. Síðsti varðin á tryggu leiðini var Fram leygardagin.

Alt, sum kundi grulva og ganga av flogbóltsáhugaðum fuglfirðingum, var komið í høllina á Kambsdali.

Kvinnurnar høvdu longu tryggjað sær gullið, og gullrúsurin var fullkomin. Skipað var longu fyri veitsluhaldi sama kvøld, og menn sóu lætt upp á dystin móti Fram.

Fyri havnaliðið Fram var hetta síðsti dysturin sum verandi føroyameistarar. Spælið hetta kappingarárið rakk ikki longur enn til eitt fjórða pláss, men ein lítil uggi kann tó vera, at teir klláraðu seg betri enn grannarnir úr Fleyr.

Fram kom til Kambsdalar við einum skerdum liði. Eingin eykaleikari var í hópinum, og tann hálvskaddi Finnur Justinussen, sum fyri tað nógva hevur spælt libero í ár, spældi allan dystin sum diagnolur og kantur.

Og Fram hevði einki at spæla fyri. Teirra møguleika at fáa nakað um hálsin var farin, og tað besti teir høvdu við sær á Kambsdali vóru minnini um eydnuna fyri einum ári síðani.

Striltið

Lat tað eisini vera sagt beinanvegin: Heldur ikki hesin dysturin hevði nakað serliga meistaraspæl at bjóða uppá. Tað er ikki nógv annað at rokna við, tá bæði liðini hava so lítið at spæla fyri.

Fyrsta settið var ógvuliga rótut, og serliga Fram funnu illa stevið. Spælararnir tóktust ørkymlaðir, og liðið varð millum annað dømt fyri uppstillingsfeil, og tað var meira enn so, at leikararnir stóðu skeivt ella vísast upp á pláss.

ÍF vann settið trygt uttan at toyggja seg stórvegis. Í einum tilíkum illa spældum setti er tað ein dygd, meistaralið duga, at hála sigurin inn.

Vendi 180 stig

So vóru vit óivað nógv, sum sótu og bíðaðu eftir, at hesin dysturin skuldi avgerast 3-0 til íF, og veitslan kundi byrjað, og Fram líktist ikki einum liði, sum kundi fáa spælið at hanga saman. Men so var ikki.

Hesa einu løtuna, 2. sett vardi, glógvaði í hjá Fram, og teir gjørdu ikki mætari enn at vinna settið.

Og øll vóru líka bilsin. Væl tilbúgni herurin av ÍF-stuðlum hevði ikki fingið handritið til hendan partin av sýningini leygardagin. Men fuglfirðingar fóru ikki niður við flagginum, og stuðulin frá sjeynda manninum var har allatíðina.

Nógv slitna orðingin um tað hamskifta ítróttaliðið kann eisini nýtast í sambandi við Fram í øðrum setti.

Fram eigur stórar og góðar blokkspælarar, og í øðrum setti var tað sum um hesir risar vaknaðu úr dvala.

Menn sum Suni Juul Pedersen og rumenski suðuroyingurin Romica Øster hava dygdir í miðblokkinum, sum eru millum tær frægastu í Føroyum.

Við settmuninum 25-23 vann Fram settið, og spenningurin var aftur í dystinum.

Aftur á beint

Fram hevði leygardagin ikki nógvar streingir at spæla upp á, og menn fullu eisini fyri møðini, og hetta gekk í stóran mun útyvir spælið.

Í øllum førum var upp- og niðurtúrurin hjá Fram ikki liðugur enn.

ÍF endaði við at vinna settið 25-11, og støðan sigur í veruleikanum alt um settið.

ÍF settið ferðina upp, og stabilu leikararnir á ÍF liðnum sendu Fram líka so skjótt niðuraftur á jørðina, eftir upptúrurin í øðrum setti.

ÍF-liðið er gott á øllum plássum. Skal glansurin takast av onkrastaðni, so má hetta vera á miðjuni. Liðið skiftir dúgliga út á miðplássunum, og tað royna seg oftani fleiri leikarar á hesum plássum í dystinum.

Hevarin er frálíka góður, og hann hevur ógvuliga stabilar hevingar út til kantleikararnar, Rúna Weihe og Boban Ilic. Liðið hevur ikki tær nógvu kombinatiónirnar, men hvat bilar tað, tá uppskriftið við kantspælinum riggar fint.

ÍF vann

Eftir lúsingin skuldi Fram royna at reisa seg aftur. Og tað gjørdi teir fyri sovítt eisini. Settið kundi gerast síðsta settið í árinum, og leikararnir hjá góvu tað, teir áttu.

Við seks troyttum monnum var tað ikki so lítið sigandi um dystin og kappingarárið, at liðini fylgdust nakað væl inn í settið, men tá tað nærkaðist endanum, fór ÍF siglandi framvið, og FM-heitið kundi pyntast við enn einum sigri.

Tá avtornaði var ÍF fimm stig frá nærmastu fylgjaranum, sum gjørdist Mjølnir. Sæð yvir eitt heilt kappingarár var ÍF væl eisini fimm stig betri enn hini liðini.

Burtursæð frá Fleyr kunnu øll vinna á øllum, og ÍF hevur klárað seg best í innanhýsisuppgerðinum, og hini liðini hava dugað at taka stig frá hvørjum øðrum.

Sosialurin ynskir ÍF til lukku við greipuni.

Bartalsteyp: Fyri triðju ferð í fimm ár kundi ÍF-liðformaðurin, Bartal Eliasen, taka ímóti virðisløninni fyri meistaraheitið.

ísaskodari: Í Fuglafirði er flogbólturin nummar eitt, og hetta merktist á øllum brøgdum leygardagin.

Mjølnir tók alt silvurið

Bæði hjá kvinnum og monnum eydnaðist Mjølni at strúka avstað við silvurmerkjunum, meðan TB hjá kvinnum og SÍ hjá monnum fingu bronsu.

FLOGBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Tá grundspælið var av fyri jól, vóru ikki ivaleysar ábendingar um, at Mjølnir skuldi fáa næstbestu heiðursmerkini í meistaradeildini hjá bæði kvinnum og monnum.

Gamaní lógu bæði liðini væl fyri og settu sín dám á oddastríðið, men hjá báðum var kappingin hørð frá liðum bæði omanfyri og niðanfyri. Kortini royndust bæði kvinnurnar og menninir hjá Mjølni so mikið væl í endaspælinum, at tað rakk til silvurmerki.

Kvinnurnar høvdu enntá framvegis ein teoretiskan gullmøguleika undan síðsta umfarinum leygardagin, tí vunnu tær sín dyst og ÍF tapti, endaði gullið í Klakskvík.

Soleiðis gekst ikki, men kortini kunnu kvinnurnar hjá Mjølni fegnast um, at tær halda fast við eina 23 ára gamla traditión hjá felagnum, sum sigur, at Mjølnir-kvinnurnar einki ár síðani 1981 hava fingið minni enn silvur — og heilar fjúrtan ferðir hevur tað verið gull!

Síðstu dystirnir

Sum sagt, høvdu kvinnurnar hjá Mjølni framvegis ein teoretiskan møguleika at vinna meistaraheitið, áðrenn tær fóru á vøllin í KÍ-høllini leygardagin at spæla móti gomlu rivalunum úr Fleyri.

Mjølnir gjørdi eisini sítt og vann dystin 3-0 við settúrslitunum 25-19, 25-15 og 25-18, men tað gjørdi ikki ordiliga mun, tá ÍF samstundis vann sín dyst og tryggjaði sær meistaraheitið — eitt stig framman fyri Mjølnir.

TB, sum tvær vikur frammanundan hevði vunnið steypakappinginia við finalu móti júst meistarunum úr ÍF, var eftir grundspælið fremsta liðið, men mátti í landskappingini taka til takkar við bronsu, tá avtornaði.

Hetta var longu greitt undan síðsta dystinum í Trongisvági, sum var móti Drátti, men kortini vann TB sannførandi 3-0. Í fyrsta og øðrum setti royndi Dráttur at geva móstøðu, men í triðja hevði TB greiðan yvirluta, so settúrslitini gjørdust 25-18, 25-23, 25-9.

Menninir hjá Mjølnir høvdu undan sínum dysti móti Fleyr tvey stig minni enn SÍ, sum hevði frí hetta síðsta umfarið, men kundu við sigri kenna seg vísar í at fáa silvur. Hetta, tí Mjølnir longu frammanundan hevði so trivaligan settmun, at SÍ ikki kundi verða verandi frammanfyri, uttan so at Mjølnir tapti.

Tað gjørdi Mjølnir tó ikki, tí mótstøðan frá unga Fleyrliðnum rakk ikki ordiliga til at manningin hjá Mjølnir fekk sveittan fram. Dysturin endaði 3-0, og í øllum trimum settunum vunnu klakvíkingarnir ruddiliga: 25-10, 25-12 og 25-9.

Besta árið nakrantíð

Veteranurin Odd Eliasen kallar hetta kappingarárið fyri tað besta í søguni hjá flogbóltinum hjá ÍF

PRÀT
Heri á Rógvi

Hann er nú føroyameistari fyri fjórðu ferð. Fyrstu ferð var í 1989, og hann endurtók bragdið árini 1999, 2001 og 2003.

Odd Eliasen er 38 ára gamal og ein av royndu hevarunum í landinum.

Tá vit fingu orð á hann eftir síðsta dystin hjá ÍF leygardagin var hann fyrndarfegin aftur at kunna kalla seg føroyameistara. Ikki bara hevur ÍF vunnið alt hjá monnum, men eisini hjá kvinnum í lægru deildunum hevur staðið væl til í ár.

– Eg haldi, at hetta er besta liðið, ÍF nakrantíð hevur havt, nú kvinnurnar eisini hava vunnið, sigur Odd Eliasen.

Í fjør endaði ÍF á fjórða plássið, og liðið líktist sera nógv tí í ár. ÌF hevur fingið styrk frá ársins leikara í farna kappingarári, Rúna Weihe, men Odd heldur, at liðið sum heild hevur staðið seg betur.

– Vit gjørdu í fjør av at royna at spæla teir yngru leikararnar inn á liðið. Eisini høvdu vit nógvar skaðar í fjør, og hvørja ferð tað tóktiskt sum um, at vit vóru á veg fram, so kom enn ein skaði í vegin, sigur Odd Eliasen.

Hann heldur, at liðið nú er nógv breiðari, og tá eitt nú Rúni Weihe hevur verið burturi, so hevur liðið eisini megnað at vunnið teir flestu av sínum dystum.

– Rúni hevur verið óførur, men eisini Bartal Eliasen og Boban Ilic hava spælt ótrúliga væl, sigur Odd Eliasen.

Magnus Tausen frá Flogbóltssambandi Føroya segði í røðuni í sambandi við steypahandina, at Fuglafjørður er lokomotivið í føroyskum flogbólti.

Um orsøkina til, at Fuglafjørður er vorðin besta flogbóltsbygd í landinum, sigur Odd, at eitt miðvíst ungdómsarbeiði og ein aktivnevnd.

– Í sínari tí var tað serliga Petur Simonsen, sum fekk glið á flogbóltin í Fuglafiði við at venja okkum. Hesi seinnu árini hava vit havt eina ótrúliga aktiva nevnd, sum hevur arbeitt ógvuliga seriøst til frama fyri felagið, sigur Odd Eliasen.

Hann sigur seg – eins og hinir leikararnir eisini vóru tað - vera heilt ovfarnan av nógva og góða stuðulinum frá fuglfirðingum leygardagin.

– Tað var ótrúliga stuttligt, sigur Odd Eliasen, sum ikki dugir fyri vist at siga, hvussu liðið hjá ÌF fer at sígggja út komandi ár, og um hann aftur verður á hevaraplássinum.

Endaliga støðan, meistaradeild, menn

	d	v	-	t	sett	v sett	t sett	+/- stig
1 ÍF (GULL)	16	14	-	2	44	10	34	20
2 Mjølnir (SILVUR)	16	10	-	6	33	23	10	15
3 SÍ (BRONSU)	16	9	-	7	30	24	6	15
4 Fram	16	7	-	9	26	29	-3	10
5 Fleyr	16	0	-	16	1	48	-47	0

Afturat FM-heitinum vann ÍF eisini steypakappingina.

Fleyr rakti botnin

Besta mansliðið hjá Fleyr hevði nógv tað vánaligasta árið í søgu felagsins. Havnafelagið hevur annars ligið væl fyri í bestu mansdeildini, men í ár hevur tað gingið heilt av skriðuni.

Endaliga støðan vísir, at tann einastui fongurin, Fleyr gjørdi, var at vinna eitt sett. Annars tapti liðið. Manningin telir fyri tað nógva ungar leikarar, og elddópurin í bestu mansdeildini hevur kravt sín mann.

Fleyr hevur havt útlendskan venjara, men ongan útlendskan leikara.

Hvussu er og ikki setti Fleyr met í ár: Vánaligasta avrikið nakrantíð í bestu mansdeildini fyri eitt heilt kappingarár.

-HR